## Havnin minkar

So løgið tað ljóðar, er fólkatalið í Havn minkað í ár. Sambært teimum seinastu tølunum hjá Hagstovuni búðu 81 fólk færri í Havn tann 1. oktober enn á nýggjárinum. Men fólkatalið í høvuðsstaðarøkinum vaks kortini, tí tann 1. oktober búðu 138 fleiri fólk í Hoyvík enn á nýggjárinum, og á Argjum gjørdust tey 14 fleiri í sama tíðarskeiðinum. Samanumtikið vaks fólkatalið í høvuðsstaðarøkinum tískil við 71 frá 1. januar til 1. oktober.

# Fiskivinnubankin skal gerast veruleiki í 2016

**Leygardagin hevði Sjálvstýrisflokkurin aðalfund á Hotel Hafnia í Havn. Aðalfundurin gjørdi hesa fundarsamtykt:**

POLITIKKUR

Átalar at Landsstýrið hækkar markið fyri, hvussu nógv kommunurnar kunnu læna. Tað eru bert fá ár liðin, síðan skuldarbundnar kommunur fingu pening úr kommunala veðhaldsgrunninum og eitt hámark ásett, fyri kommunalari lántøku.

Allar kommunur eiga at fáa javnbjóðis treytir frá tí almenna við lántøku.

Ótryggleiki valdar í samband við keyp og sølu av fiskiloyvum. Stórar peningaupphæddir skifta hendur á einum grundarlagi, sum ikki er merkt av gjøgnumskygni. Sjálvstýrisflokkurin vil, at loypandi tíðin fyri fiskirættindunum verður stytt ár um ár, soleiðis at øll fiskirættindir verða inndrigin eftir 10 árum, og ein almennur fiskidagabanki gerst veruleiki í 2016.

Umhvørvið er eitt av fremstu hjartamálum flokksins. Gransking, menning og skifti til reinari orkukeldur verða raðfest so høgt, at Føroyar gerast undangonguland á umhvørvisøkinum. Tað almenna eigur at slóða fyri, at rein orka verður gagnnýtt til upphiting í almennum bygningum. Eingi avgjøld eiga at verða á útgerð, ið minkar um dálkingina.

Fyribyrgjandi og uppsøkjandi arbeiðið á heilsuliga og sosiala økinum eigur at verða raðfest hægri. Neyðugur peningur eigur vera almanna - og heilsuverkinum tøkur, soleiðis at hjálp kann veitast, tá ið á stendur. Tað er sjúklingurin og brúkarin av almennum tænastum, ið skal setast í miðdepilin.

Landið eigur at stimbra gongdini við sjálvbodnari kommusamanlegging í eindir, sum megna at lyfta tær landsuppgávur, ið best verða røktar í nærumhvørvinum og tí verða lagdar út til kommunurnar at umsita.

Útlendingaøkið eigur at verða yvirtikið sum føroyskt sermál.

Børnini eru okkara týdningarmesta tilfeingi. "Er fólkaskúlin fyri øll"? sum skrivað stendur í lógini, mugu vit avseta neyðuga peningin og seta krøv til, at so er. Verður hetta ikki gjørt, er betri at býta sundur og seta sernámsfrøðina inn at hjálpa teimum, sum hava serligan tørv. Skipanin eigur at taka atlit til tann ymiskleika, ið er millum næmingarnar og sum ger, at við verandi skipan og undirvísingarorku fáa hvørki sterku ella veikaru næmingarnir røttu avbjóðingarnar.

Sjálvstýrisflokkurin vil virka fyri, at føroyski fólkaskúlin gerst heimsins besti skúli.





*Kári P. Højgaard*

# Dan bjóðar Óla av

**Dan R. Petersen í Fuglafirði stillar upp til formansvalið í Føroya Fiskimannafelag**

FAKFELAG

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Boðað verður frá, at Dan R. Petersen í Fuglafirði er formansvalevni til Føroya Fiskimannafelag, nú val verður í vetur. Tað kravda manningartalið og væl tað hevur undirskrivað uppstillingina, sum ikki er innlatin, tí enn leggjast manningar og sóknir aftrat. Soleiðis sigur Mortan Berjastein á Kambsdali. Hann er sóknarformaður fiskimannafelagsins í Fuglafjarðar sókn og umboðar teir, ið stilla Dan R. Petersen upp.

Um Dan R Petersen fór til skips á sínum 15-ára føðingardegi og var burtur 6 ár. Hann lærdi til lærara, og hóast hann hevur virkað sum lærari, hevur hann altíð gjørt avstingarar til sjós, flest allar summarferiur og í farloyvi í sjeyti- og áttatiárunum, tá hann var til skips. Og so var hann burtur aftur 2002-2005.

- Hesi mongu ár hevur hann stórt sæð roynt allar veiðuhættir og kennir umstøður okkara umborð, sigur Mortan Berjastein.

Dan R. Petersen var løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin frá 1998 til 2002.

- Vit halda, at tíðin er komin til vaktarskifti á Føroya Fiskimannafelag, og rætti avloysarin er Dan, sum hevur tann fyrimun, at hann er ikki bundin at nøkrum reiðara. Heldur ikki er hann bundin at ávísari drift so sum troli, línu, nót, gørnum ella fjarfiskiflotanum við meira, men kann umboða okkum allar, sigur Mortan Berjastein.



*Dan R. Petersen*